

# Søguligur dagur hjá Statoil

**Jan Müller**

07.04.2014 - 21:45

Oljan.fo

Tað var einki minni enn søguligt, tá olju- og gasspallurin Gudrun fór til verka í morgun, tí Gudrun er tann fyrsti nýggi Statoil-rikni pallurin á norskum øki síðani 2005.

- Hetta er einki minni enn ein merkisdagur hjá okkum, sigur Arne Sigve Nylund, framleiðslustjóri hjá Statoil á norskum øki, í tíðindaskrivi.

Oljan og gassið frá Gudrun verða flutt til miðstøðina Sleipner. Eftir viðgerð verður oljan send til Kårstø, og gassið fer til Evropa.

Tað er Statoil-skrivstovan í Sandnes, sum rekur Gudrun, og hetta er tann fyrsta nýggja Statoil-leiðin, sum verður rikin av Stavanger-leiðini síðani Sleipner í 1993.

Sambært Statoil eru meiri enn 16 milliónir arbeiðstímar brúktir til at útbyggja Gudrun-leiðina.

Gudrun-leiðin varð funnin longu í 1975. Trýstið á leiðini er stórt og hitin nógvur, og vantandi tøkni hevur verið ein meginorsøk til, at tað hevur tikið so langa tíð at fáa framleiðsluna í gongd.